## Sólrun aftur í politikk

Sólrun Løkke Rasmussen ætlar sær nú aftur at gerast virkin í politikki. Føroyska forsetisfrúan í Danmark var virkin í kommunalpolitikki fram til 2005, men í fyrstu atløgu varð hetta lagt á hillina, tá maðurin, Lars Løkke Rasmussen gjørdist danskur ráðharri. Men nú hevur Sólrun tikið avgerð um, at hon stillar upp fyri Venstre til kommunuvali í Gribskov. Tað skrivar Politikken. Danska kommunuvalið verður tann 17. november í ár.



## Nøvn sett á Futt

Nú hava fyrireikararnir av høvuðsstaðarfestivalinum FUTT í Býin almannakunngjørt teirra skrá, og sigast má, at fleiri av teimum bestu innan føroyskan tónleik verða at hoyra og síggja á Ólavsøku. Talan er nevniliga um Frændur, Páll Finnur Páll, SIC, Guðrið Hansdóttir, MC-Hár, Terja Rasmussen, Jens Marna Hansen, Faroe5 og Hanus G. Johansen. Seinnu árini hevur festivalurin hildið til í miðbýnum í Havn, heldur enn í Kommunuskúlagarðinum, og soleiðis verður aftur í ár. Á parkeringsøkinum við Hotel Tórshavn verður stórur pallur settur upp, og saman við Reinsarínum bjóðar FUTT har til tey bestu innan føroyskan tónleik. Festivalurin verður mánakvøldið 27. Juli, og nærri skrá verður almannakunngjørd seinni.

# Tunnilin partvís vandaleysur

**Helvtin av Norðoyatunlinum er klæddur við einum plastevni, sum ikki er vandamikið, hin helvtin við eldfima PE-skúminum undir dekkbetonginum**

TUNNIL
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár høvdu vit eina grein um, at undirsjóartunlarnir í Føroyum eru bjálvaðir við eldfima PE-skúminum, sum norsku brunamyndugleikarnir ynskja, har piparið grør. Orsøkin er, at eldurkann koma í evnið, um onkur bilur rennur á veggin og brýtur betongið, og so kann stór vanlukka henda.

Í greinini í Sosialinum gjár stóð, at eitt nýtt evni at brúka í staðin fyri PE-skúm er á veg, og at hetta evnið varð roynt í Norðoyatunlinum, men ikki brúkt har.

Tað er ikki heilt beint, upplýsir Sigurd Lamhauge, sum var projektleiðari í Norðoyatunlinum.

- Umleið helvtin av Norðoyatunlinum er klæddur við plastevninum, sum nevnist Master Seal, og ikki í nøkrum øðrum tunli er so stórur partur bjálvaður við hesum evninum, sigur Sigurd Lamhauge, sum hevur kunngjørt royndirnar úr Norðoyatunlinum í fleiri útlendskum bløðum.

PE-skúmið er í plátum, hitt verður sprænt upp á veggin og virkar sum ein innandura regnfrakki.



*Helvtin av Norðoyatunlinum er bjálvaður við einum evni, sum ikki er eldfimt. Vágatunnlin er bjálvaður við tí eldfima PE-skúminum*

## Funnu fá rúsevni við Múrin

**Narkopolitiið var við á festivalinum við Múrin, men bara smávegis rúsevni vórðu funnin**

NARKO
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað er alment kent, at á flestu festivalunum eru fleiri fólk ávirkað av rúsevnum.

Helst hevur nakað av rúsevnum verið við Múrin, tí fólk siga frá, at tey fleiri ferðir fingu bjóða rúsevni til keyps.

Narkopolitiið var við Múrin, men tað vóru ikki stórvegis nøgdir, sum politiið legði hald á.

Ein ungur maður varð tikin, tí hann hevði sjey joints í tveimum sigarettpakkum.

Ein annar, sum varð tikin, hevði eina ecstasy-tablett, hálvt gramm av hassji og hálvt gramm av skunk uppi á sær.

Politiið var væl mannað, men hundarnir vóru ikki við. Bæði við atliti til fólkini og til hundarnar hevði ikki borið til at havt hundar á festivalinum, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá politinum.